Eftirlønin størsta avbjó›ingin

Føroya Arbei›arafelag fylti 80 í gjár. Sosialurin hevur seinastu dagarnar havt samrø›u vi› Ingeborg Vinther, formann felagsins

Ingeborg Vinther sigur, at ta› skerst heldur ikki burtur, at ta› hevur gingi › bæ›i upp og ni›ur hesi 23 árini, hon hevur veri › nevndarlimur og forma›ur í Føroya Arbei›arafelag.

ARBEI‹S-MARKNA‹UR
Áki Bertholdsen

– Í áttatiárunum var ov miki› at gera. Í nítiárunum máttu vit heilt ni›ur á botn at venda. Hesi kreppuárini hava veri› tey svárastu í mínari formanstí›. Bara frá 1992 til 1994 misti Føroya Arbei›arafelag 2.200 limir, so hart rakti kreppan.

Men nú er sjógvurin slætna›ur aftur, so nú eru aftur a›rar avbjó›ingar.

Ingeborg Vinther sigur, at ein tann størsta avbjó›ingin, sum nú liggur fyri framman, ta› er at fáa eftirlønarskipanina at virka og at feløgini fáa so stóra ávirkan á hana, sum gjørligt.

– Oljuvinnan ver›ur eisini ein stór avbjó›ing, tí har mugu vit eisini ver›a upp á vakt, og fáa grei›i á, hvussu vit skipa okkum fakfelagsliga í eini møguligari oljuvinnu.

Hóast Ingeborg Vinther nú hevur veri› forma›ur í Føroya Arbei›arafelag í 20 ár, heldur hon, at hon er langt ífrá útbrend enn.

– Hetta er eitt so fjølbroytt og spennandi arbei›i, at ta› blívur ongantí› einstátta› og ta› eru ongantí› stundir at ke›a seg.

– Ta› er ongin dagur líka, tí ta› eru n‡ggjar avbjó›ingar hvønn dag og tí haldi eg, at eg framvegis havi naka› at geva felagnum.

– Vi›hvørt kann eg føla meg troytta, men ta› javnar seg skjótt. Tí hetta er krevjandi arbei›i og ta› tekur eisini nógva tí› frá privatlívinum.

Men hon brúkar eisini tí› uppá at lø›a battaríini.

– Eg fari altí› tí›liga upp. Eg føli, at dagurin er heilt oy›ilagdur, tá i› eg ikki eru tí›liga uppi. Og so svimji eg hvønn morgun, á›renn arbei›stí›. Men nú svimjihylurin er stongdur, plagi eg at fara ein gongutúr, men ta› skal vera á›renn klokkan er átta tá i› b‡urin kódnar í fer›slu.

– Annars gangi eg úti í bøi og haga hvørja løtu eg kann. Og urtagar›sarbei›i hevur eisini mín stóra áhuga, so alt í alt eri er rættiliga nógv uttandura í fvískari luft, ja, eg eri so nógv úti, sum tilber. Og so er ta› ikki at gloyma tann føroyski dansurin, sum eg gangi høgt uppí.

Tá i› vit so at enda spyrja Ingeborg Vinther, hvørji ynski hon hevur fyri landi og fólk tey komandi árini, spennir hon bogan høgt.

– Eg vildi ynskt, at ta› hev›i eydnast okkum at skapt eitt rættvísari samfelag, har stættamunurin ikki ver›ur meiri útjavna›ur, so at tey veiku í samfelagnum fingu ta› betri, og at hvør einasti føroyingur hevur ta› rættartrygd, hann hevur krav uppá.

Og so vil hon eisini, at Føroya Arbei›arafelag ver›ur enn sterkari so ta› ver›ur uppaftur betriført fyri at sláa manngar› um limir sínar og at verja borg, tá i› ágangurin er har›ur.

Drigin út í tún og avbuka›ur

– Eg ver›i› kalla›ur fyri "svartur fani" og "helvitis arabari" fleiri fer›ir um dagin, og nú eri eg troyttur. Mouldi Manai sigur, at nú hugsar hann mangan um at gevast í matstovuyrkinum í Føroyum

Leygarkvøldi› var› eitt skelkandi kvøld hjá Mouldi Manai, sum eigur matstovuna Rio Bravo og náttklubban, Manhattan, í Havn. Ein ó›ur ma›ur dró hann út í túni› eg bardi hann av vi› einum stórum træskafti

HAR‹SKAPUR
Áki Bertholdsen

Leygarkvøldi› ver›ur eitt kvøld, sum Mouldi Manai í Havn seint fer at gloyma. Tí hetta kvøldi› fekk hann ein avsmurning, sum hann ikki hevur fingi› á›ur.

Ta› var ein ma›ur, sum dróg hann út í túni› og sló hann vi› einum stórum træskafti.

– Eg var hála›ur út í túni› og buka›ur av vi› einum træskafti, grei›ir Mouldi sjálvur frá.

Hann sigur, at hann hevur tíbetur ikki fingi› álvarsligan ska›a av hesum, men hann hevur fingi› smásnuddir allasta›ni.

Tilbur›urin var› melda›ur til løgregluna og á stø›ini í Havn sigur vakthavandi, at ein ma›ur er skuldsettur fyri har›skap. Løgregluma›urin nevnir ikki nøvn, men hann sigur, at ma›urin er skuldsettur fyri at hava sligi› ein annan vi› einum træskafti, sum líkist einum baseball-træi.

Løgregluma›urin sigur, at talan var heldur um skafti› á eini sleggju.

Drigin út í tún

Mouldi Manai sigur, at yvirhøvur eru fólk bæ›i fitt og hampilig, so sum heild er onki at klaga um.

– Men ta› eru altí› nøkur, sum ikki duga at drekka og sum blíva har›lig og ikki eru grannhavandi, tá i› tey eru full.

Hann sigur, at av tí, at hann stendur sum stjóri á Rio Bravo og Manhattan, áleggur skeinkiloyvi› honum at vera til sta›ar. Samstundis eru strangar reglar fyri, hvussu nógv fólk kunnu vera inni í hølunum.

– Men hetta eru reglar, sum skulu haldast og ta› gera vit eisini.

– So var eisini leygarkvøldi›. Ta› vóru nøkur fólk, sum ikki kundu sleppa inn, tí ta› var ov fult. Sjálvandi er altí› ringt ikki at sleppa inn og ta einu fer›ina fór eg út í hur›ina at hjálpa duravørinum.

– Tá kom ein stórur ma›ur ímóti mær. Eg helt, at hann ætla›i sær inn, men ta› gjørdi hann ikki.

– Ísta›in tók hann í meg og ripti hann meg út í túni› og fór at hótta meg vi› einum træskafti. Og so langa›i hann til.

Mouldi Manai sigur, at hann minnist ikki nógv, uttan ta›, at hann small í túni›.

Hann sigur, at íme›an hann var› buka›ur, hugsa›i hann ikki um anna› enn, hvussu hann kundi sleppa undan, og nær, hetta helt uppat.

Kalla›ur alt møguligt

Men hóast kropsligi ska›in ikki var so stórur, eru sárini, hann hevur fingi› í sálina av hesum nógv djúpari.

– Hetta var eitt ræ›uligt upplivilsi og nú er ta› ein spurningur um, hvussu leingi eg tími at blíva vi›.

Men Mouldi er eisini sannførdur um, at orsøkin til, at hann var› álopin, var ikki bara fyllskapur.

– Hatta var persónligt, ta› er eingin ivi um ta›. eg veit nú, at ta› ma›urin, sum leg›i á meg, stó› uttanfyri í eini 20 minuttir, tí hann skuldi hava fatur ár mær.

Heldur tú, at orsøkin er, at tú ert úr Afrika og er littur?

– Ikki beinlei›is. Í hvussu so er ikki, tá i› fólk eru edrú, merki eg onki til ta›. Men tá i› fólk ver›a skít, kemur ta› onkuntí› fram.

– Ta› eri eg, sum skal syrgja fyri, at reglarnar ver›a hildnar, Og so tá i› fólk ikki sleppa inn, tí ta› er ov fult, tola tey ta› ikki og kalla meg "svartan fana" og "helvitis arabari". At eg skal blíva dripin, hoyri eg minst tíggju fer›ir, hvørt vikuskifti›.

Mouldi Manai sigur, at var hann bangin av lyndi, hev›i hann langt sí›ani havt pakka› saman.

Hann dylir ikki fyri, at hann pínir at hoyra fólk siga slíkt.

– Tá i› vit eru mitt í arbei›num, hugsi eg ikki so nógv um ta›. Men tá i› húsi› er stongt og eg fái sett meg ni›ur eina løtu, ella tá i› eg vakni aftur um morgunin eftir eina slíka nátt, sum hesa sunnunáttina, kemur alt fram fyri meg aftur. Og tá blívi eg keddur og føli meg ofta óynsktan í Føroyum. Hetta havi eg hoyrt sí›ani eg av fyrsta sinni kom til Evropa fyri skjótt einum lítlum mansaldri sí›ani. Og eg hoyri akkurát ta› sama enn. Ta› er onki stuttligt.

Hann sigur, at hann er troyttir av hesum. og nú kemur ta› mangan fyri at hann hugsar um at pakka saman og at gevast í matstovuyrkinum.

Strangari eftirlit

Mouldi Manai sigur, at ta› kunnu sjálvsagt ver›a ymsar meiningar um, at hann hevur matstovu og náttklubba.

– Men tey fólkini, sum gera um seg, eru ikki fólk, sum hava siti› inni hjá mær og drukki› seg full. Ta› eru fólk, sum sita heima og drekka seg full og sum fara í b‡in at vála klokkan tvey um náttina.

Hann sigur, at har, sum hann hevur veri›, sleppa fólk ikki at ganga skít og mala á alfaravegi. Bæ›i í Tunis og í Fraklandi, har hann hevur bú›, tekur løgreglan fólk, sum ganga full á alfaravegi.

– Ta› gera myndugleikarnar fyri at byrgja fyri, at naka› skal henda og at tey fara at gera um seg.

– Men ta› ger løgreglan í Føroyum ikki. Her kemur løgreglan ikki á sta›i›, fyrrenn ta› longu er gali›. Hev›i hon ísta›in fyri gjørt eitt meiri fyribyrgjandi arbei›i og snøgt sagt tiki› fólk, sum ganga skít og mala, høvdu vit havt sloppi› undan nógvum trupulleikum.

– Ta› er ikki ta› at eg vil hava løgregluna at vera barnagenta hjá mær. Ta› er heldur ein spurningur um at løgreglan í einum landi skal ver›a barnagenta hjá sínum egna fólki.

Tyrlan skal privatiserast

N‡ggja tyrlan hjá Atlantsflogi skal umframt uppgávur fyri Vaktar- og Bjargingartænastuna eisini røkja nakrar av somu tænastum, sum verandi tyrlan røkir í dag
Mynd: Edvard Joensen

Jørgen Niclasen vil hava eina føroyska tyrlu, sum seinni skal kunna privatiserast. Vinnunevndin hevur á fundi fyrrapartin í gjár vi›gjørt máli› um tyrlukeypi› hjá Atlantsflog. Nevndin gjørdi ikki heilt, sum Løgtingi› áleg›i henni, sigur nevndarlimur.

TYRLUKEYP
Edvard Joensen

Ein føroysk loysn í tyrlumálinum passar inn í politisku meiningarnar hjá Jørgen Niclasen, landst‡rismanni, sum gongur inn fyri privatiseringum.

Ta› er solei›is, váttar Jørgen Niclasen, at vi› at hava eitt føroyskt tyrlufelag, ber seinni til at privatisera hesa flúgvingina. Anna›hvørt vi› eini fullkomnari privatisering av Atlantsflogi, ella vi› partvísari privatisering av eitt nú bara tyrludeildini.

Vinnunevndin vi›gjørdi tyrlumáli› á fundi fyrrapartin í gjár, og skuldi í Tingi› vi› tí seinnapartin. Men nevndin hevur ikki gjørt alt, sum hon var› bi›in um, sigur Alfred Olsen, sum umbo›ar Sambandsflokkin í Vinnunevndini.

Heini O. Heinesen, forma›ur í Vinnunevndini, sigur, at nevndin hevur samtykt at strika navni› á føroyska flogfelagnum í lógartekstinum, solei›is at Løgtingi› kundi taka undir vi› málinum. Hann metti beint eftir fundin í Vinnunevndini, at máli› kundi fara aftur í Løgtingi› og ver›a avgreitt, sum ta› liggur nú.

Løgtingi› hev›i annars máli› til vi›ger›ar í seinastu vikum, men sendi ta› aftur í Vinnunevndini. Tingmenn vildu tá millum anna› hava or›ingina um Atlantsflog broytta.

Óheppin or›ing

Ta› var av nógvum tingmonnum hildi› vera óheppi›, at ta› var beinlei›is nevnt í lógartekstinum, at ta› var Atlantsflog sum skuldi keypa eina tyrlu, til at røkja flúgving fyri millum anna› Vaktar- og Bjargingartænastuna vi›.

Eisini eru summir tingmenn ónøgdir vi› tí›arskei›i›, nevnt er í lógaruppskotinum. Har stendur, at Atlantsflog skal hava 14 milliónir krónur árliga í 10 ár at røkja hesa tyrluflúgvingina fyri.

Í tí liggja tveir spurningar, sigur Alfred Olsen, sum umbo›ar Sambandsflokkin í Vinnunevndini.

Fyri ta› fyrsta, er hann ikki heilt sannførdur um, at ta› er rætt at lata hetta áramáli› standa nevnt í lógini. Hann metir, at eitt styttri tí›arskei› kanska kundi veri› nevnt vi› teirri grundgeving, at tøkniliga menningin er so skjót í dag, at um 10 ár standa vit kanska vi› eini ótí›arhóskandi tyrlu, sum vit ikki kunnu sleppa okkum av vi›, tí Løgtingi› hevur bundi› seg vi› hesi lógini.

Eisini vísir Alfred Olsen á, at Løgtingi› ba› Vinnunevndina kanna, um talan í veruleikanum er um fjaldan fíggjarliga stu›ul til Atlantsflog. Ta kanningina metir Alfred Olsen ikki, at Vinnunevndin hevur gjørt.

Hinvegin vil hann als ikki gera vi›merkingar til søgur, sum eru farnar at ganga um, at talan í veruleikanum er um eina bjargingarætlan, tí Atlantsflog ikki sjálvt er ført fyri at keypa eina tyrlu til rutuflúgving innanoyggja og tí skal fáa hana sum vaktar- og bjargingartyrlu.

Men Jørgen Niclasen, landsst‡risma›ur afturvísir beinlei›is øllum slíkum tosi sum ósannindum.

Alfred Olsen, løgtingsma›ur fyri Sambandsflokkin, seg›i í vi›talu vi› Sosialin fyrrapartin í gjár, at hann seinni um dagin fór at vi›gera máli› vi› restina av tingmanning Sambandsfloksins.

Manglandi prískanningar

Heini O. Heinesen, forma›ur í Vinnunevndini, vísir á, at ta› er samtykt í Løgtinginum, at lata Atlantsflogi 10 milliónir krónur í ár, sum er ein partur av teirri upphædd, sum er vi› í lógaruppskotinum um tyrluflúgvingina.

Men forma›urin í Vinnunevndini harmast um, at ongar kanningar eru gjørdar a›rasta›ni av, hvat ein slík tænasta kann fáast fyri.

Men tær kanningarnar eru gjørdar, sigur Jørgen Niclasen, landsst‡risma›ur vi› fiskivinnumálum, sum hevur lagt uppskoti› um tyrluflúgvingina fyri Løgtingi›.

Hann sigur, at arbei›sbólkurin, sum hevur fyrireika› keypi›, hevur kanna› gjølla, hvat slíkt kostar. Og landsst‡risma›urin váttar, at tænastan kundi fingist bíligari a›rasta›ni, men at hann hevur valt føroysku loysnina, tí hann vil hava førleikan á føroyskar hendur.

Um avtala var› gjørd vi› eitthvørt útlendskt tyrlufelag, sum hev›i tyrlu standandi, sum kundi veri› brúkt til endamáli›, var ivaleyst talan um eina brúkta, ni›urgoldna tyrlu.

Men í hesum førinum er talan um eina n‡ggja, sum Atlantsflog skal keypa, sigur Jørgen Niclasen. Og ta› er ein rættiliga d‡r íløga. Hann vísir á, at kapital kostna›ur - keypsprísur og trygging - venjingar og manningarlønir koma upp á 12,8 milliónir krónur, longu á›renn tyrlan yvirhøvur lættir sær á. Og so kemur raksturin omaná.

Jørgen Niclasen heldur fast um, at grundin til, at máli› hevur skund, ikki er, at nøkur tyrla longu er keypt, uttan at tilsøgn var givin frammanundan.

Men hann váttar, at ein avtala› er gjørd - sum tó ikki er undirskriva› - um eina ávísa tyrlu, sum Atlantsflog hevur fingi› forkeypsrætt til. Og ver›ur máli› ikki avgreitt skjótt, er vandi fyri, at avtalan ver›ur av ongum, og so kunnu ganga fleiri ár, á›renn ein slík tyrla fæst aftur, sigur landsst‡risma›urin.

Ta› er nevniliga so, at slíkar væl útgjørdar tyrlu eru mangulvøra á markna›inum. Bí›ití›in er long, og fleiri eru um bo›i› at fáa júst hesa tyrluna skilst.

Talan er kortini ikki um eina spildurn‡gja tyrlu, skilir Sosialurin. Men um eina tr‡ ára gamla, sum tekniskt er so væl útgjørd, sum eingin onnur tyrla í danska kongaríkinum.